# Tjóvar herjaðu í Vestmanna

**Náttina til fríggjadagin gjørdu nakrir tjóvar um seg í Vestmanna, har teir brutu inn í bæði Føroya Banka og NB-handilin**

INNBROT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað er ikki frítt, at vestmenningar hava havt vitjan av nøkrum tjóvum í farnu viku. Tvey innbrot vóru framd, og sambært løgregluni bendir alt á, at talan var um innbrot, ið vóru væl fyrireikað.



*Náttina til fríggjadagin gjørdu tjóvar um seg í Vestmanna, har teir brutu inn í bæði Føroya Banka og NB-handilin.*
*savnsmynd*

## Fóru miðvíst til verka

Fyrst vóru tjóvarnir á vitjan í NB-handilinum ella hjá Brogaard, sum vestmenningar rópa handilin.

Har hava tjóvarnir fyrst brotið eitt gamalt pengaskáp upp, men til fánýtis, tí tað pengaskápið var ikki longur í nýtslu, og har var tí einki at fara eftir.

Síðani fóru teir í holt við eitt annað pengaskáp. Tjóvarnir høvdu tikið ein vinkulslípara við sær, og hann nýttu teir í royndunum at bróta pengaskápið upp, men tað eydnaðist teimum ikki.

Miseydnaðu royndirnar við pengaskápunum góvu sostatt einki úrslit, og tjóvarnir løgdu síðani eftir einum sigarettskápi. Tá gekk betur, og teir fingu tikið nakað av sigarettum við sær, áðrenn teir rýmdu úr handilinum.

Á kriminaldeildini á politistøðini í Havn verður sagt, at tjóvarnir vóru farnir ógvuliga miðvíst til verka í handilinum, og teir høvdu annars ongan skaða gjørt í handlinum. Sambært løgregluni bendir alt á, at talan var um eitt væl fyrireikað innbrot, tí tjóvarnir høvdu tikið ymisk amboð við sær, ið teir skuldu nýta í strembanini eftir tjóvagóðsi.

## Alarmur stygdi tjóvarnar

Tjóvar hava eisini roynt at brotið inn í Føroya Banka í Vestmanna fríggjanáttina, og løgreglan ivast ikki í, at talan er um somu persónar, sum brutu inn í NB-handilin.

Fyrst hava tjóvarnir brotið ein rút í vindfanginum í bankanum, men tá ið teir eru farnir úr vindfanginum og víðari innar í bankan, var ein alarmur settur í gongd, og tað hevur ivaleyst stygt tjóvarnar burtur, verður sagt á kriminaldeildini á politistøðini.

Kriminaldeildin arbeiðir við málunum, men sagt verður, at í løtuni hevur løgreglan ongar slóðir í málunum.

# Løgreglan stongdi tivoli

**Sunnukvøldið stongdi løgreglan eitt tivoli, sum var sett upp á Óðinshædd við Hoyvíksvegin í Havn**

TIVOLI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Fríggjadagin bleiv eitt tivoli sett upp á Óðinshædd beint við gamla Ide-húsið. Talan er um eitt enskt tivoli, sum steðgar á í Føroyum í nakrar dagar, áðrenn leiðin gongur víðari til Íslands. Longu fríggjakvøldið var latið upp, men sunnukvøldið stongdi løgreglan tivoliið.




*Mánamorgunin var ikki nóg lív at síggja í tivolinum á Óðinshædd, sum løgreglan stongdi sunnukvøldið*
*Mynd: Terji Nielsen*

## Ikki neyðug loyvi

Løgreglan fekk sunnukvøldið fráboðan frá fólki, sum stúrdu fyri trygdini í tivolinum, tí vindurin var so nógvur. Hóast nógva vindin koyrdu framvegis karrusellir og annað í tivolinum, og fólk stúrdu fyri, at partar av tivolinum kundi fara um koll í nógva vindinum.

Løgreglan fór á staðið, og tá ið tey høvdu tosað við starvsfólkini í tivolinum, fingu tey illgruna um, at alt ikki ruggaði rætt. Tað vísti seg nevnliga, at starvsfólkini í enska tivolinum vóru polakkar, og tivoliið hevði als ikki fingið loyvi til at hava opið her í Føroyum, og starvsfólkini høvdu heldur ikki fingið loyvi til at arbeiða her í Føroyum.

Tí gjørdi løgreglan ikki mætari enn at stongja tivoliið, og tað letur ikki upp aftur, meðan steðgað verður her í Føroyum, verður upplýst av politistøðini. Sum áðurnevnt skal tivoliið víðari til Íslands, og væntandi verður farið avstað seinni í hesi vikuni.

## Durðavørður fangaði tjóv

Sunnunáttina tók ein maður eina fløsku av brennivíni inni á Manhattan í miðbýnum í Havn, men hann var fangaður av einum durðavørði.

Tysti maðurin var gestur inni á Manhattan, tá ið hann bráddliga stjól eina fløsku av brennivíni í barrini og rann avstað. Durðavørðurin, ið var til arbeiðis á Manhattan, rann eftir manninum, og hann fekk fatur á honum aftur beint við Káta Hornið.

Løgreglan varð boðsend, men maðurin slapp sær til rýmingar, áðrenn løgreglan kom á staðið. Manhattan fekk tó fløskuna aftur, og á politistøðini verður sagt, at tey hava illgruna um, hvør maðurin er, og hann verður tí tikin inn á støðina til avhoyringar fyrsta dagin.

**tn**

## Skal inn at sita

Um døgurðatíð fríggjadagin tók løgreglan í høvuðsstaðnum ein mann, sum koyrdi bil, hóast koyrikortið er tikið frá honum.

Av tí at maðurin koyrdi bil í »frakendelsesperioden«, sum tað eitur á politimáli, kann hann vænta at skula inn at sita, tí tað er vanligt í sambandi við slík lógarbrot.

**tn**

## Vinnudagurin verður 23. september

Aftur í ár skipar Vinnuhúsið fyri vinnudegnum. Vinnudagurin verður í ár 23. september, og í sambandi við dagin verður ein føroysk fyritøka kosin ársins virki.

Vinnudagurin í ár er tann sjeyndi av sínum slag, og aftur í ár fer dagurin at bjóða upp á eina røð av fyrilestrum um vinnuviðurskiftir og framtíðina, skrivar Vinnuhúsið á heimasíðu sínari.

**tn**